**FOÍB og viðmerkingar til Veðurlagslóg**

Tøkk fyri innbjóðan. Havi við mær Tommy Petersen, løgfrøðing. Hann hevur verið ráðgevi hjá FOÍB í fleiri førum. Og hevur annars arbeitt bæði á Almannastovuni, Jarðfeingi og í Vinnumálaráðnum eins og í FAS. Hann hevur eitt stórt innlit í samfelagsviðurskifti og eisini vinnulívið. Í sínum arbeiði hjá danska stovninum DANIDA í fleiri londum hevur hann fingið eitt gott innlit í altjóða viðurskifti. Tit hava fingið útprint av mínum innleggi saman við grein í Weekendavisen. Og eg havi so eisini bókina Oljan við, sum Tróndur Djurhuus og eg hava skrivað. Hon kann fara í arkivið hjá Rættarnevnd/Løgtinginum, um tað ber til.

Áðrenn eg vil umrøða tað vit arbeiða við fari eg at royna at vera konstruktivur og koma við okkara niðurstøðu:

“FOÍB tekur undir við átøkum, sum við tíðini eru við til at minka um útlátið, samtíðis sum tey eisini eru við til bæði at halda samfelagshjólunum gangandi og menna tey og sum varðveitir okkara vælferðarskipan og tekur hædd fyri broytingum og møguleikum í føroyska samfelagnum.

Vit skilja væl føroysku vinnufyritøkurnar, sum liva av útflutningi til onnur lond, og sum hava latið hoyringsskriv inn til landsstýrið, har tær raðfesta burðardygd eins og vilja fylgja krøvum og reglum, sum okkara keyparar áleggja teimum. Vit í Føroyum verða í nógvum noydd til at fylgja altjóða rákinum, men vit eiga ikki at gloyma, at vit mugu skapa okkara egnu framtíð, sum byggir á teir møguleikar og harvið eisini tað tilfeingi, sum finst her.

Vit eru tó ikki vís í, hvussu umráðandi tað er at gera eina veðurlagslóg bindandi, soleiðis sum tað verður lagt upp til. Vón okkara er, at júst hesin parturin fer at fáa meiri viðgerð í nevndararbeiðinum og seinni í aftur løgtinginum - hvørjir eru fyrimunirnir og vansarnir við at gera hesa lóg bindandi.

FOÍB ynskir so eisini at koma við einum uppískoyti til lógina antin sum part av lógaruppskotinum ella sum ein týðandi viðmerking, og er tað soljóðandi:

“Veðurlagslógin má undir ongum umstøðum forða fyri leiting eftir og framleiðslu av olju og gassi í føroysku undirgrundini og harvið seta fót fyri víðari samfelags- og vinnumenning í Føroyum."

**Mugu vera á varðhaldi**

Orsøkin til at vit gera vart við hetta er fyri at forða fyri, at lógin verður misbrúkt, soleiðis at hon eitt nú kann brúkast til at steðga antin leiting ella framleiðslu av kolvetnum. Tað er ikki ókent, at tað eru tey, ið vilja oljuna, har piparið grør og ikki vilja hoyra talan um at troyta hesa yvirhøvur, og sum nú lovprísa øllum hugsandi veðurlagstiltøkum, og kunnu hugsast at vilja brúka júst hesa lógina sum eitt amboð ímóti eitt nú oljuleiting og framleiðslu við Føroyar. Tað heldur FOÍB ikki, at hesi skulu hava møguleika fyri.

**Olja og gass og tess týdningur fyri Føroyar**

Eg skal so royna at undirbyggja týdningin, sum ein møgulig oljuleiting og framleiðsla kann fáa fyri Føroyar.

FOÍB roynir at  stuðla uppundir leitingina eftir olju og gassi í Føroyum. Haraftrat er ein týðandi partur av okkara arbeiði eisini at marknaðarføra føroysku veitingarvinnuna í útlandinum. Hesi bæði - leiting og seinni útbygging og framleiðsla og veitingar til offshorevinnuna - eru partur av somu søk. Eini góðari søk fyri Føroyar.

FOÍB heldur tað annars vera rætt at gera Føroyar til part av tí altjóða rákinum, sum er rundan um grøna orkuskiftið og veðurlagsmál. Flestu okkara taka undir við grøna orkuskiftinum og vilja verja náttúruna og umhvørvið. Spurningurin er bara, hvussu vit gera hetta og hvussu vit røkka okkara málum. Spurningurin er um antin ella vilja fleiri siga. Vit siga – bæði og, tí oljan og gassið eru partur av grøna skiftinum. Tey eru m.a. við til at fíggja tað. Tey gera, at vit kunnu menna varandi orkuna yvir eitt tíðarskeið, sum krevst. Tey eru ein partur av orkumiksinum, sum snýr seg um at troyta fleiri orkukeldur rætt og skilagott um sama mundið. Oljan og gassið eru ikki trupulleikin. Tey eru partur av svarinum og loysnini  í mong mong ár aftrat. So einfalt er tað.

Tað er umráðandi at gera sær greitt, hvat tað er vit vilja og gera við eini bindandi veðurlagslóg. Hon má ikki smoyggjast niður yvir høvdið á okkum og gerast ein forðing fyri nátúrligari  menning av føroyska samfelagnum. Og hóast vit í nógvum vilja fylgja altjóða rákinum, so eiga vit ongantíð at gloyma okkum sjálvi, tað vit eru og standa fyri. Loysnir aðrastaðni kunnu vera góðar hjá okkum eisini, men ikki treytaleyst og neyðturviliga. Vit mugu tí taka støði fyrst og fremst í okkara egna samfelag - hvussu vit vilja hava, at hetta samfelagið skal síggja út fleiri ættarlið fram - vitandi, at vit eisini vera noydd til at laga okkum eftir altjóða avtalum og gongdum.

Ein veðurlagslóg eigur at leggja lunnar og skapa karmar. Hon eigur tó ikki at gerast ein endalig resept uppá, hvussu samfelagið kann og skal mennast. Fyri tað skulu vit sjálvandi stremba eftir burðardygd og einum reinum umhvørvi og náttúru. Hetta kann gerast uppá nógvar mátar. Ein er at brúka okkara skilvísi og seta høg etisk mál. Hon má tó ikki gerast ein forðan fyri menning.

Tíverri síggja vit fleiri dømi um hetta í øðrum londum, har trýst frá víðgongdum felagsskapum oø. er við til at køva menning á fleiri økjum. Onkur vil fara so langt sum at kalla avleiðingina av hesum fyri eina “avindustrialisering” av Evropa. Í Týskalandi hava vit sæð myndugleikarnar leggja niður kjarnorkuverk og kolaorkuverk fyri at geva rúmd fyri grøna orkuskiftinum fyri síðani ikki at kunna liva upp til hetta og verða noydd til at lata uppaftur kolaorkuverkini. Í Bretlandi síggja vit somu gongd, har oljuleiting og útbyggingar av olju og gassi verða bannað við arbeiðsloysi og prísvøkstri sum úrslit og við tí avleiðing, at landið gerst enn meira heft at innfluttari olju og gassi úr einaræðislondum. Slíka gongd eiga vit í Føroyum at royna at sleppa undan.

Vit koma at hava tørv á olju og gassi leingi aftrat um somu tíð sum vit menna og troyta varandi orkukeldur. Eitt samfelag, sum brúkar nógva olju eigur eisini at framleiða sína egnu olju, um hon finst.  If you use it, you produce it.

**Ásannandi**:

**-at** orka er lívsneyðug fyri eitt samfelag - bæði fyri fólkið og fyri virksemið í landinum - er tað av allarstørsta týdningi alla tíðina at tryggja, hvussu vit best kunnu fáa orkuna til vega og til høldar.

**-at** føroyska samfelagið byggir á tað, sum fólkið her og landið kann forvinna og útinna - hevur atgongd til sítt egna tilfeingi.

**-at** tí vit í dag byggja okkara samfelagsbúskap á serstakliga tvær høvuðsvinnur, pelagiska fiskin og alingina, sum bæði eru sera viðkvom fyri broytingum, marknaðarvirðurskiftum, sjúku oø., eru vit noydd til troyta tað tilfeingi, sum finst í landinum, her eisini møgulig ráevni í undirgrundini.

**-at** dugnaligir og klókir føroyskir politikarar og embætisfólk hava megnað at fáa Føroyum ognarrættin til undirgrundina og ráevni í henni eins og at fáa eitt rættvíst undirgrundarmark til okkara næsta granna Bretland – hevur serstakliga verið við oljuleiting og -vinnu fyri eygað

**-at** tað eru týðulig tekin til, at olja og gass finst í føroysku undirgrundini, og at hesi kunnu gerast eitt nýtt bein undir føroyska búskapinum.

**-at** tað fer at taka mong ár, áðrenn Føroyar megna at lyfta grøna orkuskiftið fult út og tí vilja vit eisini í mong ár hava tørv á bæði olju og gassi, her ikki minst í okkara fiskiflota, sum er ein sera týðandi partur av øllum búskapinum. Men eisini í øðrum vinnum.

**-at** vit eiga at troyta okkara egnu olju og gass í undirgrundini, heldur enn at skula vera bundin av innflutningi av hesum.

**Ásannandi hetta so staðfesta vit**, at ein komandi veðurlagslóg má ikki sleppa at seta fót fyri leiting eftir og framleiðslu av føroyskari olju og gassi, tí hetta kann fáa stóran týdning fyri føroyska samfelagið í framtíðini.

Tí mælir FOÍB til at fáa við í lógartekstin ella í viðmerkingarnar til lógina hetta brotið:

***"Veðurlagslógin má ongantíð koma hartil, at hon verður ein forðing fyri at útinna leiting og framleiðslu av kolvetnum í Føroyum."***

**Viðmerking til tingviðgerðina**

FOÍB hevur eisini hesa viðmerking til kjakið á tingi um veðurlagslógina, tá tingfólk helt lítið ella einki um royndirnar at leita eftir olju og gassi í Føroyum. Tað segði, at nú varð einki hent á hesum øki leingi og hví skuldi man blíva við at trúgva uppá oljuna. Tað er rætt at einki felag hevur søkt um leitiloyvi í mong ár, men Jarðfeingi hevur gjørt stór frambrot í sínum arbeiði at finna prógv um, at kolvetni kunnu finnast í undirgrundini og hevur kunnað umheimin um tað. Stórar oljukeldur eru funnanr beint hinumegin markið, og útlit eru til, at virksemið um okkara leiðir bara fer at vaksa. Og hetta er nakað, sum vit eiga og kunnu gera okkum dælt av, og tað er við til at styrkja trúnna uppá, at her eisini finst eitt tilfeingi í okkara undirgrund, men eftir øllum at døma ynskja ikki øll tingfólk hetta.

Vit halda, at man tá gloymir, hvussu viðbreknar okkara høvuðsvinnur eru og týdningin av at troyta tað tilfeingi sum helst finst. Og hugsið um allar teir hundraðtals føroyingar, sum arbeiða í oljuvinnuni í øðrum londum, hvussu nógv teir tilføra okkara lítla samfelag, og

hvussu fegnir teir høvdu verið fyri at komið heim at ment oljuvinnuna og harvið gjørt okkum minni bundin av innfluttari olju. Tað kenst løgið, nú okkum tørvar fleiri inntøkur til samfelagið, at tað eru politikarar, sum ikki ynskja, at vit skulu royna at at finna eitt nýtt tilfeingi, sum vit longu eiga og sum kann vera eitt nýtt bein í búskapinum.

Skulu vit bara standa og hyggja at, meðan bretar fara at framleiða olju og gass fáar kilometrar frá markinum og helst fara at finna enn meira olju har. Og somuleiðis bara hyggja at, meðan norðmenn gera eitt nýtt fund fyri og annað eftir ikki so langt frá okkara norðara marki? Vilja føroyskir politikarar forða fyri, at vit kanna, um olja er í okkara undirgrund, samtíðis sum ein stórur meirluti av føroyingum veruliga ynskir, at vit fara eftir oljuni?

FÓIB heldur, at vit eiga at lurta eftir hvørjum øðrum. Sjálvandi fer oljan fyrr ella seinni at verða heilt avloyst av aðrari orku, og sjálvandi skulu vit vera partur av hesi gongdini og stuðla grøna orkuskiftinum, men at kvetta á stokkinum her og nú, tá olja og gass eru so týðandi orka og eru partur av orkumøguleikunum, halda vit í FOÍB vera skeivt og entá eina vanlukku.

Í FOÌB staðfesta vit gongdina serliga í Evropa, har orka er við at gerast ein mangulvøra og tí ein hóttan móti bæði lívi og vælferð. Vit hava leingi verið heft at russiskari olju og royna nú at sleppa úr hesum haftinum. Vit eru nú við at gerast heft at amerikanskari gassorku ístaðin, tí vit ikki megna at framleiða okkara egnu olju og gass. Hetta m.a. tí, at roynt verður at seta fót fyri leiting og framleiðslu av tí olju og gassi, sum vit eftir øllum at døma hava nokk av í eitt nú Norðsjónum.

Okkum tørvar at vera opin fyri øllum hesum og tora at umrøða støðuna, áðrenn vit í skundi taka óhepnar avgerðir, sum kunnu koma okkum afturum brekku.

**Um FOÍB**

FOÍB stendur fyri Føroya Orkuídnaðarbólk. Tað kom í verðina umleið ár 2000, tá fyrstu loyvini vórðu latin til oljuleiting. Felagið tók yvir uppgávurnar hjá GEM samstarvinum, sum var eitt framúr samstarv millum oljufeløgini, sum høvdu fingið leitiloyvi og so føroyskar myndugleikar av ymsum slag. Endamálið var at gera umhvørviskanningar undan boringunum og var hetta arbeiðið hálovað av mongum, tí ongantíð áður í heiminum fóru leitifeløg í felag saman við myndugleikum í holt við tað so týðandi umhvørvisliga forarbeiðið. Hetta var ein stórur íblástur til føroyska samfelagið, sum kundi læra av royndunum og vitanini hjá eini heilt nýggjari vinnu, ið varð kend fyri at seta høg umhvørviskrøv til sín sjálvs undan boringum. Tað ber til at lesa um hetta so áhugaverda og týðandi tíðarskeiðið í føroyskari vinnu- og samfelagssøgu í bókini “Oljan”, sum Tróndur Djurhuus og Jan Müller hava skrivað.

FOÍB skifti navn við tíðarrákinum, sum tók til sín grøna orkuskiftið og ber FOÍB í dag orku sum heild og ikki bara oljuna í sínum heiti. Hetta hevur so eisini víst seg aftur í arbeiðinum hjá felagnum, sum mongu seinastu árini eisini hevur tikist við mál viðvíkjandi grønari og varandi orku eitt nú orku frá vindmyllum bæði her heima og í umheiminum.

FOÍB tók so eisini stig til at bjóða stjórannum í stóru hetlendsku grønu orkuverkætlanini Orion til Føroya. Henda fyritøkan stakk út í kortið framtíðar orkupolitikkin í Hetlandi við bæði vindmyllum og olju- og gassinstallatiónum í og kring Hetland eins og ætlanina at leggja elkaðal millum Hetland og skotska meginlandið. Vitjað varð hjá bæði SEV, landsstýrinum og

fleiri øðrum  fyri at kunna um verkætlanina hjá grannanum. Kunnandi almennir fundir vórðu eisini hildnir bæði í Havnini og í Klaksvík.

Felagið fekk atlimaskap í meginfelagnum hjá bretsku orkuvinnuni, OEUK, Offshore Energies UK og hevur við hesum fingið atgongd til alt hugsandi tilfar á orkuøkinum eins og hevur kunnað luttikið á ráðstevnum ol. hjá felagnum. Hetta hevur givið innlit í bretsku orkuvinnuna sum heild eins og hevur ment netverkið hjá felagnum.

Samstarvið hevur so eisini havt við sær, at FOÍB hevur boðið umboðum fyri orkuvinnuna í Bretlandi til Føroya, eitt nú leiðsluni í Equinor í Bretlandi, sum hevði høvi at vitja fleiri føroyskar ídnaðarfyritøkur og verða partur av stórum tiltaki, sum FOÍB skipaði saman við Sjóvinnufelagið í Tórshavn. Equinor kunnaði tá um stóru Rosebank útbyggingini við føroyska markið og varð umrøtt, hvørjar møguleikar føroyskir veitarar høvdu at vera partur av verkætlanini. Tá varð eisini borið so í bandi, at vitjað varð hjá SEV, sum fekk møguleikan at kunna um grøna orkuskiftið í Føroyum eins og Equinor kundi greiða frá grønu verkætlanunum hjá felagnum bæði í Bretlandi og Norra.

Við royndunum hjá FOÍB at stuðla uppundir marknaðarføringina av leitingini á føroyska landgrunninum hevur FOÍB so eisini roynt at geva sítt íkast á bæði ráðstevnum og messum í umheiminum. Og á slíkum tiltøkum brúkt møguleikan at kunna um føroyskar veitingarvinnu eins og oljuleiting við Føroyar.  Sum limur í bretska systurfelagnum hava vit eisini fingið atgongd til teirra umhvørvi og tiltøk, eitt nú varð ruddað slóð fyri, at umboð fyri Jarðfeingi kundi hava framløgu á ársfundinum hjá felagnum við meira enn 600 luttakarum, har greitt varð frá Open Door skipanini í Føroyum eins og kunnað varð um nýggjastu granskingina og kanningarnar hjá Jarðfeingi í sambandi við oljuleiting á landgrunninum og her serstakliga út móti markinum til Bretlands.

Um tvær vikur fer FOÍB á ársfundin hjá norska systurfelagnum, Offshore Norge í Oslo, har tað verða nærum 1000 luttakarar, vinnulívsfólk, politikarar oo. Millum fyrilestrarhaldararnar verða bæði forsætisráðharrin Jonas Gahr Støre eins og orkuráðharrin. Ein av høvuðsrøðarunum verður stjórin í Equinor, Anders Opedal. Eitt av stóru evnunum á ársfundinum verður sum vera man orkutrygdin í Evropa og sjálvandi eisini norska orkuframtíðin.

Har verður so vónandi høvi hjá FOÍB menna sambond og  at kunna um Føroyar, tvs. veitingarvinnuna her og væl útbygda undirstøðukervið, sum alt saman er klárt til at taka ímóti enn eini leiting eftir olju og gassi á landgrunninum. FOÍB fer so eisini í kunningartilfari at kunna um hetta og serstakliga um ætlaninar og vónirnar til nýggja leiting, sum bæði løgting og landsstýri ganga inn fyri.

Í mong ár hevur FOÍB umsitið føroyska orkuportalin orkan.fo, sum roynir at kunna føroyingar um orkumál av ymsum slag bæði heima sum burturi. Í góðum samstarvi við eigararnar av Portal.fo er orkan.fo vorðin ein fastur táttur í føroyska miðlalandslagnum. Og sum ein tann seinasta uppgávan varð nú um dagarnar tikið stig til eina veljarakanning um oljuleiting við Føroyar. Úrslitið av hesari finst á orkan.fo.

Umframt  Jan Müller í Havn, so er  Louis Apol Wilson, umboðsmaður hjá FOÌB í Bretlandi.

Vegna FÓIB, 17. februar 2026

Jan Müller, stjóri